DAGSINS MEINING

Nú er at fara í arbeiðsklædini

Tað ber ikki til at siga, at talan hevur verið um friðarligar og romantiskar hveitibreyðsdagar hjá nýggju samgonguni. Hon er stutt sagt komin so illa frá startinum, sum tað ber til. Í staðin fyri at taka tøkini, sum so dyggiliga tykjast vera neyðug orsaka av syndarliga figgjarliga fatninginum, sum landskassin er í, so hevur samgongan ligið tvør, meðan skuldsetingarnar hava floymt yvir tann eina landsstýrismannin.

Fyrrapartin í gjár reageraði so løgmaður. Tað skal hann eiga rós fyri. Seinastu seks árini hava tað verið alt ov nógv dømi um, at naggatódnin bara er vorðin størri og størri, tí løgmaður hevur bíðað og bíðað í vón um, at viðurskiftini fóru at greiða seg sjálvi. Løgmaður eigur at vera upp á forkant við gongdina. Um hann ikki hevði reagerað í gjár heldur enn í dag, so høvdu trupulleikarnir, ið eru komnir í ljósmála seinastu vikuna, ikki bara verið trupulleikarnir hjá landsstýrismanninum og sambandsflokkinum. Teir høvdu eisini verið trupulleikarnir hjá samgonguni og serliga hjá løgmanni. Við stignum hann tók í gjár, hevur løgmaður livað upp til tað, sum hann sambært stýrisskipanarlógini eigur at liva upp til.

Løgmaður loysir landsstýrismenn úr starvi, sigur stýrisskipanarlógin, og tað hava vit fleiri ferðir verið vitni til. Tað stendur eisini í stýrisskipanarlógini, at løgmaður útnevnir landsstýrismenn. Tað mugu vit staðfesta, at hann ikki ger. Tað eru tingmanningarnar, ið reelt eiga tann lutin, og prosessin, ið førir fram til útnevningina, hevur ikki altið verið so tespulig.

Nú kunnu vit spyrja, um tað ikki hevði havt verið skilabetri, um løgmaður hevði átt størri reellan part í leiklutinum, ið stýrisskipanin formliga sigur, at hann eigur at hava. Spurningurin er eisini, um tað er rætt, at løgtingið bara skal hyggja at og ikki hava møguleikan at gera viðmerkingar til, hvør verður landsstýrismaður. Gamaní ber til at seta uppskot um misálit fram, og tað hevði ivaleyst komið eitt sovorðið uppskot ímóti fiskimálaráðharranum í morgin, um løgmaður í gjár ikki hevði fyribyrgt hesum. Men tað undrar, at løgtingið ikki kann hava møguleika at tala, áðrenn tað er komið so mikið langt. Hetta eigur at geva stoff til eftirtanka. Tá ið Bill Clinton hevði tikið við sum forseti í USA í 1993, var skilið ringt. Fleiri av útnevningum hansara vóru óhepnar, og hann noyddist at taka onkrar aftur. Tey árini, hann var forseti, verða mett at vera millum tey við størsta framburðinum hjá USA. Fyrstu vikurnar hjá nýggju samgonguni hava í besta førinum verið óstoðugar. Fyritreytir áttu at verið fyri, at tað, ið fer at koma aftaná, verður sum hjá USA undir Clinton. Viljin og kemiin tykjast vera til tað.

Spurningarnir um leiklutin hjá pressuni, og um Johan Dahl var juridiskt sekur ella ikki, fara at verða endavendir, og tað er gott og sunt fyri fólkarættið. Løgmaður nýtti í hesum førinum politiska myndugleikan, ið hann hevur, og sum er grundaður á politiska meting av stoðuni. Tað eigur hann rós fyri. Ráðini eru ikki til hólmgongu um avgerðina hjá løgmanni. Sambandsflokkurin eigur í samráði við løgmann at finna rætta persónin til uppgávuna í fiskimálaráðnum, og so eiga øll at líta frameftir. Tað hevði sømt seg politikarunum.

Hveitibreyðsdagarnir fingu ein bráðan enda. Samgongan kann nú fara í arbeiðsklæðini, og landsstýrismenninir sleppa ikki at keða seg. Nóg mikið er at takast við. Fyrsta takið er figgjarlógin. Í tí arbeiðnum er serliga hjá figgjarmálaráðharranum og løgmanni saman við samgonguni at vísa handalag og áralag, ið sømir seg búnum politikarum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Dumpaður í peningaútláni

A. Guttormur Djurhuus



Alivinnan dumpað?

Tá tú hoyrir forstjóran í Føroya banka siga at Føroyar eru dumpaðar í fiskaaling hevur tú hug at smíl-ast. Hvør var tað sum hjálpti alivinnuni at bera so í bandi at hon dumpaði við buldur og brak? Tað skulu rættiliga stórar upphæddir til í alivinnuni fyri at sleppa at dumpa so ógvusliga sum hon gjørdi. Var tað ikki sami forstjóri sum figgjaði dumpingina, sum nú, sum ketta upp úr høvdatrog, kemur við útsøgnini um at alivinnan er fokin?!

Vinna uttan regluverk

Tá tað á skræðuni sá út sum um tað gekk frammá hjá alingini var einki at hoyra um at lógarkarmurin fyri vinnuna ikki var í lagi. Lænt varð út uttan fyrilit, og spurnaðartekin var ikki sett við nakað. Heldur ikki tá, var gjørligt at seta aliloyvini í veð og eisini var avmarkað hvussu nógv ið útlendingar kundu eiga í vinnuni. Ikki eitt kis hoyrdist.

Tað var sjálvandi tá tað skuldi verið loyst upp fyri møguleikanum fyri at fingið inn meira av útlendskum kapitali í vinnuna. Tað hevði helst verið skilagott og givið vinnuni betur skipaði viðurskifti.

Vøkstur uttan neyðugar karmar

Fyrilitarleysi vøksturin av vinnuni, sum varð gjørd møgulig við hjálp frá peningastovnunum, varð gjørd uttan at nýtiligur lógarkarmur nakratið varð smíðaður. Ongar reglur fyri fluttning av sjúkum fiski ella hvussu hann skuldi fyribeinast. Ongar ella ónýtiligar reglur um frástøðu millum alibrúk. Ongar reglur fyri sóttreinsing av fluttningstólum. Ongar reglur fyri hvussu nógvur fiskur kundi haldast í hvørjum rúmmetri. Einki eftirlit. Snøggt sagt vóru reglur fyri onkrar týdningarleysar smálutir sum Heilsufrøðiliga starvsstovan hevði sett í verk, men lítið og einki av slíkum sum hevði týdning.

Og alt hetta vistu pen ingastovnarnir, samstundis sum teir lótu pening streyma inn í vinnuna.

Smoltið

Smoltið, sum útsett hevur verið, hevur verið so vánaligt at tað mesta av tí átti ongantíð at sloppið í ein aliring. Fyrsta fyritreyt fyri at alingin skal heppnast er at tú hevur smolt sum er á hægsta góðskustøði. So langt komu vit ongantíð. Og peningastovnanir sum figgjaðu vistu, ella áttu at vita, at so var.

ILA og marknaðarprísir

So kom ILA og vánaligir marknaðarprísir og góvu alingini mønustingin. Marknaðarprísin er ringt at gera nakað við. Og tó so. Bakkafrost hevur, við at leggja seg eftir aðrari frameiðslu enn kruvdum fiski og at ikki gera aðrar íløgur enn tað sum alneyðugt er, ein roknskap fyri 2003 sum er fyrimyndarligur. Teir eru í hvussu so er ikki dumpaðir!

Hvat ið ILA viðvíkir er einki sum bendir á annað, enn at tað er smittutrýstið og hvussu strongdur ið fiskurin er, sum avgerða um útbrot av ILA verður ella ikki. Um henda ábendig er rætt ella ikki skuldi verið lagamanni hjá Landsdjóralæknaembætinum og Heilsufrøðuligu starvsstovuni at kanna.

Útlendskur kapitalur

At latið verður upp fyri útlendskum kapitali nú, kann vera eitt tvíeggja svørð. Tá er vandi fyri at alingin, øll sum hon er, fer á útlendskar hendur fyri lítið og lætt. At avtikið íløguavmarkingarnar, áttið at verið gjørt tá ið alingin var sum best fyri. Nú er helst betur at bíða til hon hevur fótað sær aftur, so at nakað kann fáast fyri hana.

Hvørjir dumpaðu?

Teir sum fyrst og fremst dumpaðu í alingini vóru uttan iva peningastovnarnir, sum figgjaðu alingina, uttan at tryggja sær at veðsetingarmøguleikarnir og lógarkarmarnir annars vóru í lagið.

Í øðrum lagi dumpaði politiska skipanin sum ikki tók sær av at gera neyðugar og brúkiligar karmar til vinnuna.

Í triðja lagi dumpaðu alarnir sjálvir, men tað hevdu teir neyvan gjørt uttan hjálp frá politisku-umsitingarligu skipanini og peningastovnunum.

Sjáldsamur farmur við Norrönu

FARMUR

Tá ein skotskur reinsdjórabóndi ynskti nýtt blóð til reinsdjórini hjá sær, fór hann við bili til Norðursvøríkis, har hann keypti 19 tarvar. Á veg heimaftur gekk leiðin yvir Hanstholm, har maðurin og tarvarnir vórðu fluttir við Norrönu til Lerwick.

Á túrinum hjá Norrönu úr Hanstholm í síðstu viku vóru eisini fýrabeint ferðandi við umborð. Talan var um 19 svenskar reinsdjóratarvar, sum ein skotskur bóndi hevði keypt við býin Jokkmokk í Norðursvøríki. Tá handilin var avgreiddur, gekk suður aftur ígjøgnum Svøríki við bili og víðari við ferju til Danmarkar.

Síðani var nøsin sett móti havnini í Hanstholm, har Norrönu lá klár at taka ímóti. Komnir til Lerwick í Hetlandi gekk leiðin víðari við ferju til Aberdeen í Skotlandi.

Norröna hevur flutt reinsdjór úr Svøríki til Skotlands umvegis Hanstholm og Lerwick

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggdagar klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Lívsverkið hjá Anfinni!

Kai Vágfjall

Tá nýggja sokallaða breiða samgongan hevði skrivað undir samgonguskjalið, reypaði Anfinn Kallsberg av, at hetta var hansara lívsverk. Hvat hann meinti við, veit eg ikki rættuliga, men eg giti at tað vóru sjálvstýrismálini.

Um vit nú blaða í samgonguskjalinum 2002 - 2006, so finna vit hesi mál, sum táverðandi samgonga hevði sett sær fyri at útinna á sjálvstýrisleið:

Yvirtøkur:
Familjurættarmál
Havumhvørvi
Kortlegging
Upphavsrættur
Vinnulóggáva
Tilbúgving
Veðurtænasta
Vitaverk
Uppmerking
Fjølmiðlaábyrgdarlóg
Arbeiðs- og uppihaldsloyvi
Tinglýsingin
Fólkakirkjan
Flogvøllurin
Loftferðslumynduleikin
Løgregla og rættarskipanin

Samgonguskjalið hjá "breiðu" semjuni hevur sett sær hesi mál, á tí sum teir kalla "sjálvstýrisleið":

Yvirtøkur:
Fólkakirkjan
Fjølmiðlaábyrgdarlóg
Vinnufelagslóggáva
Tilbúgvingin
Tinglýsingin

Ikki eitt orð um at Føroyar skulu gerast sjálvbjargnar ella um sjálvberðandi búskap. Einki um sjálvsavgerðarrætt. Í staðin verður ríkiseindin hálovað og grundlógararbeiðið verður steðgað. Jú hetta var lívsverkið, sum Anfinn hevði at reypa sær av, uttan at rodna. Eitt syndarligt úrslit!

Fólkaflokkurin óálítandi og svikaligur

Ikki kann sigast annað, at fólkaflokkurin hevur roynst svikaligur samstavspartnari hjá teimum flestu. Í 1980 sleit hann ACE-samgonguna vegna eitt ferjukeyp. Val varð útskrivað í ótíð, og fór hann tá í samgongu saman við B og D. Aftur sleit A samgongan í 1990 millum ABE. Aftur varð val útskrivað í ótíð, og eftir valið kundu A og C einsamallir gera samgongu. Nú skuldi veri laga á monnum, tí færri flokkar í samgongu, jú minni klandur, men so var ikki. Fólkaflokkurin sveik enn einferð samgonguskjalið, og tær avtalur, sum hann hevði skrivað undir uppá.

Í 1998 fingu vit tað søguligu sjálvstýrissamgonguna ADE. At byrja við var stevið gott, men tá fólkaflokkurin sveik fólkið og leyp frá avtaluni/lyftið um fólkaatkvøðu, fór samstarvið at skinkla.

Fleiri ferðir samráddist fólkaflokkurin undirhonds við t.d. javnaðarflokkin um nýggja samgongu, men hetta eydnaðist ikki, tí hvør vil fara í samgongu við slíkum óálítandi og svikafullum samstarvspartnara? Tá nýggj samgonga varð skipað eftir valið í 2002, sveik fólkaflokkurin enn einaferð, við at geva andstøðuni tingformannin. Størri háð og vanvirðing hevur enn eingin vist einum samstarvspartnara her á landi.

Føroya fólk gav undan farnu samgongu álitisváttan við valið, men aftur her sveik fólkaflokkurin veljaran og samgonguflokkarnar. Hann vildi heldur droppa sjálvstýrið og geva seg undir sambandsflokkin, hóast hann fekk boði framhaldandi samstarv við øðrum fólkafloksløgmanni, men hetta varð vrakað, tí tað skuldi verða eitt diktat varð sagt. At sambandið og javnaðarin gav teimum sama diktat hevði minni at siga. Umráðandi var at hevna seg inn á tjóðveldi og enn einaferð svíkja samstarvspartnaran og vinna honum neisur, so vertin á hvat meirilutin av føroya fólki ynski.

Borgarlig samgonga

Einaferð, tá ein samgonga slitnaði har C og A vóru partar av, segði táverðandi løgmaður Atli P. Dam, at hann ikki vildi sita í samgongu og bara umsita borgarligan politik. Tá eg lesi nýggja samgonguskjalið íggjognum, sum ikki er annað enn røntan og krutl, finni eg bara borgarligan sambandspolitik har, og eitt evarska líti vet av "sjálvstýrispolitikki", sum er sera gjánkasliga orðað, so nú er vent í holuni. Har eru eingi javnaðar-fingramerkir at finna. Teir rappau dúgliga undan valinum, at vend mátti koma í, men ídag vendur alt tann skeiva vegin So onkur hevur selt seg til bara at umsita borgarligan politik, einans fyri at gerast løgmaður í eina stutta tíð. Klandrið byrjaði longu dagin eftir. Teir vistu ikki hvat teir høvdu skrivað undir uppá, og klandrið heldur áfram.

Yvirtøkur verða ongar, og als ikki nøkur yvirtøka av fólkakirkjuni. Sambandsflokkurin sigur seg vilja yvirtaka kirkjuna, men gamaní at siga seg vilja yvirtaka, tá ein altíð leggur afturat: ikki nú, men tá vit hava ráð. Soleiðis kunnu vit bíða í 100 ár um tað skal vera.

Tvøroyrarskjalið endaði í pappírskurvuni. Hetta skjal, sum varð undirskrivað av danska forsætisráðharranum og fyrrverðandi løgmanni, sum segði, at so at siga alt kundi yvirtakast. Aftur nú verða myndir vístar í hesum døgum í bløðunum frá hesi undirskriving, meðan nakrir býráðslimir av Tvøroyri standa sum tinsoldátar aftanfyri, sum eitt slað av "body guards". Sambandsvongurin í fólkaflokkinum vann, og lívsverkið hjá Anfinni blakað á køstin. Hann má bara makka rætt. Jú eitt syndarligt úrslit av einum lívsverki. Við einum so ivasamum og svikaligum flokki, verður samgonguni ikki langt lív lagað.

Seinasta viðmerking

Hans Jacob Joensen
biskupur

Í viðtali við Dimmalætting hósdagin 12. februar 2004 sigur Sigmundur Poulsen, advokatur: »*Tað stendur beinleiðis í grundlógini, at øll, eisini tey, ið virka innan politikk, skulu frítt njóta øll tey njótilsi av øllum borgarligum rættindum.*« Hann sipar ivaleyst til § 70 í grundlógini, har sagt verður: *Ingen kan på grund af sin trosbekendelse eller afstamning berøves adgang til den fulde nydelse af borgerlige og politiske rettigheder eller unddrage sig opfyldelsen af nogen almindelig borgerpligt*. Eg kenni meg nú reiðiliga sannførdan um, at henda grein ikki sipar til trúarsamfeløg, fakfeløg og aðrar felagsskapir, sum øll hava ávísar treytir fyri limaskapi.

Men í dag er tað ein veruleiki, sum vit mega viðurkenna og liva við, at landsstýrismanninum í kirkjumálum nýtist ikki at vera limur í evangelisk-lutherstu kirkjuni. Tí við setanini av Jógvani á Lakjuni sum landsstýrismanni í kirkjumálum, hevur løgmaður staðfest, at allir borgarar í Føroyum eiga henda rætt. Men hóast Jógvan á Lakjuni sum landsstýrismaður kann umsita kirkjumál fyri alt landið, so kann hann tó ikki sambært galdandi **lóg um kirkjuráð** vera limur í kirkjuráðnum, har hann býr, og vera við til at umsita tey mál, sum kirkjuráðini umsita. Tí loyvi eg mær at spyrja, um hetta ikki stríðir ímóti hesi tolking av nevndu grein í grundlógini? Hetta er jú eisini ein skerjing av teimum rættindum, sum hann sambært hesi tolking av grundlógini eigur. Og er tað tí ikki neyðugt beinanvegin at fáa hetta broytt?

Tað verður eisini sambært **lóg um setan í starv í fólkakirkjuni** kravt av eitt nú prestum, próstum og biskupum, at teir skulu verða limir í evangelisk-luthersku kirkjuni. Men er ikki eisini tað ein skerjing av teimum rættindum, sum teir sambært somu tolking av grundlógini eiga? Teir kunnu eins væl og landsstýrismaðurin í kirkjumálum virka samsvarandi evangelisk-luthersku trúarjáttanini, hóast teir ikki eru limir.

Fylgjan av hesi tolking av grundlógini og serstakliga fylgjan av setanini av einum landsstýrismann í kirkjumálum, sum ikki er limur í evangelisk-luthersku kirkjuni, má verða, at limaskapur í evangelisk-luthersku kirkjuni er uttan týdning. Nú eiga allir føroyingar, antin teir eru limir ella ikki, somu rættindi í fólkakirkjuni og harvið eisini í evangelisk-luthersku kirkjuni.

Men eg skal tó leggja afturat, at eg eri alt annað enn samdur í hesi tolking, og eg ræðist fyri fylgjunum fyri evangelisk-luthersku kirkjuna sum fólkakirkju.

Who's next?

Poul M. Rasmussen

Fríggjamorgunin farna komu so "prógvini", ið skuldu eitast at staðfesta, at nýútnevndi fiskimálaráðharrin ikki einans er kreativi smáfuskarin, sum fjølmiðlarnir hava roynt at útnevnt hann til, men ein veruligur lúshundur, ið ikki smæðist við at gera seg inn á einkjur og faðirleys …..

Onkrastaðni var tó varðhugin av at hava hoyrt, um ikki sangin, so tó lagið, áður.

So hvørt sum leið út á dagin, var ikki sørt, at einum kom til hugs Stoltenberg-episoduna, tá lokala fjølmiðla cremé de la crémé'ið kappaðist um ókritiskt at endurgeva Norðuratlantsbólkin á Fókatingið, men (av misgáum?) gloymdi at forhoyra seg hjá høvuðspersóninum.

Déjá-vu'ið varð fullgjørt í Degi & Viku.

Dynamiska duo'in, Magnussen & Winthereig, mestsum endurtóku kunststykkið fyrrverandi varalømgans, sum í sínum eginleika av »journalisti« næstan breyt inn á landsfund Sambandsfloksins, tí formansval var á skránni.

Ólukkutíð - eisini antiklimaxið endurtók seg - hesuferð sluppu tey tó undan at útseta Gekkin.

Treyðugt so, søgan endar ikki her …..

Einki forgjørt er í at miðlarnir kappast um at vera fyrst við tí síðsta. Neyvan høvdu teir tó mist stórvegis, um teir untu sær sjálvum at mett um relevansin av tilfarinum.

At nakrir býráðslimir hava mist álitið á landsstýrismanninum er nøkulunda eins týðningarmikið og um Vágsheyggja Vatnfelag hevur álit á Jógvani við Keldu sum landsstýrismanni, ella um undirritaði hevur álit á George Bush sum forseta, familjufaðiri ella bilförara …..

Onkur man tó hava hildið kvababbilsini hjá býráðslimunum havt týðning. Á Portalinum hjá Føroya Tele (ið mær vitandi ikki hevur samdøgursvakt) er tíðarfestingin 03:43 ….. og so var skráin fyri leygardagin sett.

Ein torir næstan ikki at hugsa um, hvussu fjølmiðlasirkusið hevði verið, um onkur lýddi í oyrað á onkrum »journalisti« at Jógvan á Lakjuni onkuntíð roykti hassj, tá hann í 70'unum gekk í Hoydølum, ella at Jóannes Eidesgaard hevði moggað eini 12-ára gamlari smágentu (Tveir aldeilis óhyrligir pástandir, ið einki hava við veruleikan at gera, men eru tiknir úr egnum barmi fyri at ímynda absurditetin, og uttan samanbering av brotsverkum annars!!!)

At søgan um »The big bad Dahl« kemur fyri dagsins ljós er í finasta lagi.

At restin av fjølmiðlunum, eftir øllum at dømi ókritiskt, taka søguna fyri áljóðandi, er ivasamt.

At partamenn hansara so detta hvør um annan í royndini at fáa hendur á hamarum og naglum, í krossfestingarherferðini, er djúpt beklagiligt.

Skilamaðurin Eilif Samuelsen fekk einaferð hann á tingið segði, at nú ráddi um ikki at leypa framav, at vita frá einum mótstøðumanni, at tað var eyðkent fyri sambandsmenn als ikki at leypa.

Havi sjálvur tað álit á tingbólki Sambandsfloksins, sum mær vitandi er samansettur av toluliga skilagóðum heiðursfólki, at hava tey góðtikið frágreiðing fiskimálaráðharrans, var allarhelst enn einaferð talan um eitt vegetar-fregnir (einki kjøt á søguni). Kemur annað og meira undan kavi, eru tey ivaleyst at sær komin at taka neyðug stig.

Ímeðan vit bíða eftir, hvør ið stendur fyri tørni næstu ferð, kundu vit roynt at tikið við læru av okkara, á summum (verri enn so øllum) økjum frálíka, fyrrverandi løgmanni og hansara Kallsbergsku »lat-okkum-nú-sigga-tíðina-ann-og-taka-ta-tíð-tað-tekur« filosofi.